<u>At skriva stíl</u>

Tá ið tú skalt skriva ein stíl er gott at fylgja eini mannagongd, so tú fert frá einum punkti til annað.

Hetta er ein brúkiligur bygnaður:

**Yvirskrift**

**Inngangu**r: slag av teksti, sum tú skrivar um, høvundur, útgávuár

**Bulur**: Stuttur samandráttur (uml 6-10 reglur)

Persónslýsingar (Greið frá týdningarmestu persónunum)

Sjónarhorn (við hvørjum eygum uppliva vit hendingarnar og hugsanirnar?)

Tíð (nær fara hendingarnar fram?)

Evni (hvat evni verður viðgjørt í tekstinum?)

**Endi:** Drag samanum, hvat kanst tú siga um tekstin, nú tú hevur arbeitt hann væl ígjøgnum. Sig tína hugsan. Tú kanst eisini samanbera við t.d. tín gerandisdag. Hvat hugsar tú um endan á stuttsøguni / tekstinum?